– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Dámlig og fittlig tvíhús í Hvalvík

**Húsini standa væl fyri ovast í nýggja býlinginum í Hvalvík og hava panoramaútsýni**









### Fyrsta fatanin

Tú koyrir niðan í hugnaligu og væl skipaðu byggingina í ovasta parti av Hvalvík. Tú sneiðir inn í gøtuna og merkir alt fyri eitt tætta, heimliga og barnavinaliga umhvørvið beint uttan fyri hurðina. Húsini standa við blindan veg, og har er friðarligt og veðurgott. Dagstovnur, skúli og sparkivøllur eru tætt við.

### Ljós og luft – stílur og snið

Komin inn um hurðina fært tú somu fatan. Góðska og dygd eru sett høgt, og litirnir eru ljósir. Fert tú inn í stovuna, kemur tú inn í eitt stórt rúm við stórum vindeygum og panoramaútsýni yvir Sundalagið. Tú kennir teg ikki innilokaðan á nakran hátt, men tvørturímóti sum ein part av grannalagnum, umhvørvinum, landslagnum, náttúruni og stóru verð. Alt er ljóst, svalligt og lætt. Gólvini eru úr góðum tilfari, og køkurin er ljósur, arbeiðsligur og handligur. Vendir tú borðinum, ber væl til at borðreiða til fleiri fólk í borðstovuni. Fert tú upp læltt-gongdu trappurnar, kemur tú til eina væl innrættaða og gangnýtta hædd. Har er hjúnarúm, baðirúm við brúsu og 2 kømur. Í kjallaranum er vaskirúm / goymslurúm, og har er góður møguleiki at gera fleiri rúm.

### Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, durur, baðirúm við brúsu, grovkøkur/vaskirúm, køkur/stova og trappa upp á ovastu hædd. Í erva er trappugongd, hjúnarúm, baðirúm við brúsu og 2 kømur . Í neðra er kjallararúm/fýrrúm.

### Fakta

| | |
|---|---|
| **Adressa** | Undir Hamri 28 b, Hvalvík |
| **Byggiár:** | 2007 |
| **Hæddir:** | 3 |
| **Gólvvídd:** | 184 m² |
| **Grundøki:** | 283 m² |
| **Prísuppskot:** | kr. 1.400.000,00 |









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**